# ETRI ENN EINKI



**GOTT BRÚDLEYP**

***Brúdleypið hjá Esmar og Guðrun er gott. Heilt gott. Ikki fantastiskt, men nógv betri enn einki***

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Skal eg kunna vísa á eitt av veiku punktunum í øllum shownum, so er tað at har til tíðir er for nógv av tí, sum vit longu hava hoyrt. Tú kennir hatta við, at ein krønika er ikki líka stuttlig aðru og triðju ferð, tú hoyrir hana. Tú flennir við, men ert ikki líka ovfarin, sum fyrstu ferð tú hoyrdi hana.

Ta somu kensluna havi eg eitt sindur eftir brúdleypið hjá Esmar Eysturoy og Guðrun. Tónleikurin var, fyri tað nógva, gomlu hittini hjá Pipar&Salt. Og tónleikurin er ikki beinleiðis stuttligur.

Hinvegin er tónleikurin hjá Pipari&Salt góður. Og tá eg sigi, at hetta er eitt av teimum veiku punktunum, so er tað upp á ein máta rós til manningina aftanfyri Pipar&Salt. Tí tónleikurin er góður. Hetta eru løg, sum hava plágað alt landið, tá tey komu fram, og tú verður ikki troyttur av at hoyra løgnu løgini ummaftur.

## Nógv betri enn einki

Eftir at hava sovið upp á showið, eri eg sannførdur um, at Brúdleypið hjá Esmar og Guðrun er betri enn einki. Rættiliga nógv betri. Eg eri eisini sannførdur um, at í øllum førum 998 av hinum fólkunum í høllini á Hálsi halda tað sama – jú, har er altíð ein, sum heldur at tað var hvørki vert eitt ella annað, og friður verið við honum.

Spurningurin er so, um hetta er eitt gott show. Mítt greiða svar er ja. Er hetta eitt fantastiskt show. Nei. Er Brúdleypið hjá Esmar og Guðrun fyri 220 krónur í undirhaldi? Tað er eingin ivi í míni sál um, at hetta eru væl brúktir pengar.

Brúdleypið hjá Esmar og Guðrun er gott. Heilt gott. Ikki fantastiskt, men nógv betri enn einki.